# Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 28. oktober 2019
Mál nr.: 19/00311
Málsviðgjørt: HKV

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
| --- | --- |
|  | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 191 frá 21. desember 2018, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 33.** Annars skal, tá inntøkan verður uppgjørd, dragast frá,<br>(...)<br>18) Tøkugjald, rindað sbrt. § 2 í løgtingslóg um loyvisgjald á alivinnu. | **1.** Løgtingslógaruppskotið Í § 33, stk. 1 verður aftan á nr. 18, sum nýtt nr. sett: “19) upp til kr. 50.000 árliga av inntøku hjá lærlingum. Sum lærlingur er at meta persónur, ið er fevndur av einum galdandi lærusáttmála. Talan skal verða um lærusáttmála, ið er góðkendur av Yrkisdeplinum, ella um lærusáttmála, har úbúgvingin er skipað og lønt sambært sáttmála millum fakfelag og arbeiðsgevara á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Persónur, ið er í starvsvenjing sum partur av útbúgving síni, er ikki at meta sum lærlingur. Fevnir lærutíðin einans um ein part av inntøkuárinum verður frádrátturin fyri inntøkuárið veittur lutfalsliga, har dagatalið sum lærlingur verður sett í |

| | |
|---|---|
| | mun til dagatalið í árinum. Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur fyri umsókn, váttan, tíðarfreistir og annað, og í hesum sambandi eisini reglur um, at neyðugir upplýsingar og skjøl skulu latast umvegis talgildu sjálvgreiðslurnar hjá TAKS |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020. |